# Ovveiða kostar Føroyum minst 100 milliónir Dkr um árið

HÓRALDUR JOENSEN
Granskingarleiðari



**Ótolmaður gessur eftir havsins gulli hevur ført til grova neyðtøku av føroyskum fiskastovnum. Talan er serliga um toskastovnarnar og upsastovnin. Toska- og upsaveiða er stórt sæð horvin. Tey seinastu nógvu árini hava vit veitt smáfisk, millumfisk og stórseið. Hesin harðrendi og eirindaleysi ágangur móti fæframleiðandi tilfeingi alra okkara kostar føroysku tjóðini minst 100 milliónir Dkr um árið**

**Toskurin**

Í 2006 varð ein løtt útgáva av greiningum av veiðutrýstinum á føroyskar fiskastovnar almannakunngjørd í tíðarritinum Frøði (Regin Reinert, Frøði 2/2006). Úrslitið av hesum kanningum vístu, at veiðutrýstið eftir upsa og toski hevur verið 2 ferðir og 3 ferðir so høgt sum tað veiðutrýst, ið kann væntast at geva størstu lívfrøðiligu og fíggjarligu úrtøkuna. Høvundurin nýtir rættuliga sterkar orðingar og vísir á, at veiðutrýstið eftir toski seinastu árini hevur verið burtur úr vón og viti. Í dag er ein stórur partur (70 – 80) % av veiðuni smáfiskur (aldur < 2,5 ár, longd < 45 cm) og millumfiskur (3 ár < aldur < 5 ár, 45 cm < longd < 70 cm). Restin (20-30) % er toskur (6 ár < aldur < 20 ár, longd > 70 cm).

Høga veiðutrýstið á staðbundnu toskastovnarnar ger, at sveiggini í stovnsstøddunum gerast rættuliga ógvuslig. Fyrilitarleysa veiðan higartil ger, at eitt nú Landgrunnstovnurin hevur nógv stórri sannlíkindi fyri at minka niður á hættisliga váðamarkið fyri gýtingarstovnin, sum liggur umleið 5000- 6000 tons. Avleiðingin kann verða óbótaligur vistfrøðiligur, sosialur og fíggjarligur skaði. Hevði veiðutrýstið harafturímóti verið tað tilráða frá Fiskirannsóknarstovuni (FRS) og ICES, so høvdu sannlíkindini verið smá fyri, at stovnurin hevði minkað langt niður um lívfrøðiliga skilagóða FRS-ICES-markið, ið er umleið 20.000 tons. Miðalvektin av toski hevði vaksið. Stovnurin, veiðan og fíggjaravkastið hevði verið tryggari og støðugari. Mongdin av livur, rogni og innvølum hevði eisini verið væl størri.

**Hagfrøðiligar greiningar**

Hagfrøðiligar og lívfrøðiligar greiningar av fylgjunum av hesum alt ov høga veiðutrýstinum hava greitt víst, at var veiðutrýstið optimalt, so kundu í meðal umleið 5000 tons/ár verði landaði meira av toski øll tey seinastu 20 árini. Tað merkir, at við einum toskaprísi ájøvnum 20 kr/kg, so kundi føroyska tjóðin vunnið 100 milliónir Dkr meiri um árið, høvdu vit fylgt ráðunum frá sakkunnleikanum á Fiskirannsóknarstovuni og ICES. Seinasta 20-ára skeiðið hava vit altso mist umleið 2 milliardir Dkr. Ein uppphædd, ið hevði kunnað fíggjað bæði Tangafjarðar-tunnilin og Skopunarfjarðar-tunnilin. Hetta stóra tapið stavar einans frá skilaleysa toskafiskiskapinum. Aðrir stovnar eru eisini trároyndir.

**Upsin**

Veiðutrýstið eftir upsa hevur verið og er framvegis alt ov høgt. Í dag er veiðan 100% stórseiður og 0% upsi. Í áttati-árunum vigaði ein vanligur upsi (2 - 3) kg. Í dag, 20-30 ár seinni, vigar stórseiðurin (1-2) kg. Varð veiðutrýstið skert, so sum mælt til av FRS, so høvdu vit fingið stórri og betri fisk og veiðan hevði verið virðismiklari. Livra- og rognanøgdin hevði eisini verið væl stórri.

**Miðaldarhugburður valdar**

Men vit, Føroya fólk umboðað av Løgtinginum og Landsstýrinum, hava higartil valt at venda blinda eyga og deyva oyra til sakkunnleikan. Litið verður ikki á rannsóknarúrslit. Einki álit er á vísindum. Vit og skil verður ikki nýtt. Vinnulívið er vanstýrt. Fæ til gransking og menning verður mett sum útreiðslur í Føroyum, alla aðrastaðni er tað ein íløga. Vit hava ikki ráð at granska og menna. Umheimurin hevur ikki ráð at lata vera. Vit hava ikki ráð at taka rogn og livur. Umheimurin hevur ikki ráð at blaka ráevnini burtur. Upplýsingartíðin er útihýst. Partur av grundleggjandi hugburðinum her á landi er framvegis miðaldarligur.

**Marina Skaparverkið hótt**

Harðrendi og eirindarleysi ágangurin móti fæframleiðandi tilfeingi alra okkara kann í ringasta føri avlaga vistskipanir og íleguligt lívfrøðiligt margfeldi (genetiskan biodiversitet) í so stóran mun, at framdi skaðin á marinu økoskipanirnar verður óbótaligur. Niðurfiskaði Canadiski toskastovnurin er eitt ræðandi dømi; hesin er ikki komin fyri seg enn, hóast fullkomið varandi veiðubann varð sett í gildi 1992.Torført er at ána nakran munagóðan djúptøknan tøknifrøðiligan, lívfrøðiligan og vistfrøðiligan vísdóm í higartil førda fiskivinnupolitikkinum. Høvuðsvinnugreinin, vit sita á, verður spakuliga og miðvíst avsagað. Innantóma og irrationella materialisman tykist at vera farin í sjálvspinn. Sjálvsøkni, úrnýtsla og ótamd egoisma vísa enn einaferð hógvar, horn og hala. Vit og skil eru úrkøkt. Moralur, etikkur og náttúran eru lágt raðfest. Móti hesum lívstýnandi hugburði og siðafrøðiliga forfalli eru kioskupplatingartíðir sunnumorgnar í Havn, homosexualitetur og grein 266B týdningarleys viðurskifti. Men hygnu andaligu slóðararnir syvja. Aðrir tosa í svøvni. Moralskt myrkur valdar. Einki lýsi er á lampuni. Hugburðsbroyting er bráðneyðug. Ein kvirtil av konduite, ein færri av fyriliti, eitt vet av virðing og spekt yvir fyri marina Skaparverkinum hevði verið almannagagnligt og ynskiligt.

# Halt teg til politikk, løgmaður

ZACHARIAS BECH
Porkeri

Hoyrdi nakað av orðaskifti úr løgtinginum, tórsdagin 8. mai millum Magna Laksafoss, løgtingsmann og Jóannes Eidesgaard, løgmann um yvirtøku av fíggjareftirlitinum.

Magni Laksafoss grundgav við greiðum orðum fyri, hví sambandsflokkurin ikki kundi taka undir við at yvirtaka fíggjareftirlitið.

Hann vísti til útsagnir frá bankastjórum og einum íslendskum fíggjarfrøðingi, sum allir søgdu, at tann føroyski fíggjarheiminurin fór at fáa tað trengri, um fíggjareftirlitið bleiv yvirtikið av føroyingum.

Tá løgmaður kom við sínum svari, skuldi ein trúð, at hann kom við einari grundigari forkláring, hvar fordeilirnir við hesi yvirtøku vóru.

Men tað kom hann ikki.

Í staðin kom hann við einari langari forkláring um sambandsflokkin, líka frá tí, at hann bleiv stovnaður í 1906 og fram til dagin í dag. At sambandsflokkurin hevði verið ímóti øllum framburði í Føroyum. Teir vildu ikki vita av flagginum, teir vildu ikki vita av tí føroyska málinum og teir vóru ímóti at byggja vegir og havnir. Teir vildu ikki taka ábyrgd av nøkrum og høvdu teir í dag fingið sín vilja, so høvdu teir flutt alla ábyrgd niður aftur til Danmark.

Hetta er nakað av tí, vit eru vanir við at hoyra frá tjóðveldisflokkinum, so tað er einki at ivast í, at løgmaður í hesi samgongu við tjóðveldinum er komin í gott selskap, og er fegin um at vera sloppin frá tí »ábyrgdarleysa« sambandsflokkinum frá seinastu samgongu.

Løgmaður hevur, eftir tí, sum hann sigur, ikki álit á sambandsflokkinum.

Tað plagar ikki at vera góður siður í løgtinginum at fara eftir teimum, sum farnir eru undir grønu torvu. Men tá løgmaður ger tað, so kann eg ikki lata vera við at nevna at nógv er broytt í javnaðarflokkinum frá tí, at P. M. Dam var formaður fyri flokkin. Tá hann eftir valið í 1958 skuldi út í Tinganes sum løgmaður, treytaði hann sær, at Kristian Djurhuus, sum tá var formaður fyri sambandsflokkin, kom við út í Tinganes at umsita fíggjarmál. So stórt álit hevði hann á sambandsflokkin.

Ella kann tað hugsast, at úttalilsi hjá løgmanni um sambandsflokkin kemur frá einum frustreraðum løgmanni, sum í samgongu noyðist at sita heima og ansa eftir sínum landsstýrismonnum, meðan Høgni Hoydal, tann veruligi leiðarin av samgonguni, ferðast »land og rige« runt at umboða Føroyar uttanlands.

So er tað kanska ikki nógv skeivt í tí, sum framstandandi tjóðveldismaður, tá henda samgonga var komin undir land, segði, at nú høvdu teir roytt allar fjaðrarnar av løgmanni, so at hann sat spillnakin.

Er hettar prísurin javnaðarflokkurin hevur goldið, fyri at Jóannes Eidesgaard framhaldandi kundi sleppa at sita sum løgmaður, so er hann dýrur.

Fyri at koma aftur til ábyrgd, sum var grundgevingin hjá løgmanni fyri at yvirtaka fíggjareftirlitið.

Havi ongantíð duga at sæð, at sambandsflokkurin, teir sum manna flokkin í løgtinginum, og teir mongu veljarar, sum mynda flokkin, hava víst minni ábyrgd yvir fyri landinum enn aðrir. Heldur tvørturímóti. Tað er fleiri ferðir prógva.

Ein leiðari vísir ábyrgd, tá hann ger umstøðurnar betri hjá tí fólki, hann er leiðari hjá. Tað verður tað ikki eftir serkønum útsøgnum við at yvirtaka fíggjareftirlitið.

So, harra løgmaður, halt teg heldur til politikkin enn at lýsa søguna hjá sambandsflokkinum við niðursetandi tónum frá tingsins røðarapalli.

# Upplýsingar mugu útflýggjast

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



Um formaðurin í uttanlandsnevndini hevur fingið upplýsingar um, hvørji ítøkilig úrslit eru komin burtur úr vitjanunum hjá landsstýrismanninum í uttanlandsmálum í 7 ymsum londum, eigur nevndarformaðurin at útflýggja hesar upplýsingar uttan at drála.

Hvør er uttanríkispolitikkurin hjá Føroyum, og hvat er ítøkiliga komið burtur úr almennum ferðum og fundum hjá landsstýrismanninum í uttanlandsmálum í tilsamans 7 londum?

Hesar báðar spurningar reisti undirritaði alment í gjár.

Beinleiðis orsøkin til spurningarnar er, at Løgtingið hevur ikki fingið nakra kunning um hesar spurningar, hóast Tingið hevur játtað at lata uttanríkisráðnum hjá heimastýrinum 30,7 mió. kr. til virksemi tess.

Undirritaði heitti somuleiðis á formannin í uttanlandsnevndini um at útvega nevndini og Tinginum kunning um nevndu spurningar.

Útvarpið tók málið upp í tíðindaflutningi sínum í gjár. Har segði Jenis av Rana, formaður í uttanlandsnevndini og partur av CHE-samgonguni, m. a., at nevndin hevur fingið nøktandi kunning frá uttanríkisráðnum, og at ongin tørvur er á at fáa meira kunning.

Úttalilsið hjá nevndarformanninum samsvarar ikki við gerðabókina hjá uttanlandsnevndini, ið má metast at vera ein álítandi kelda, ið embætisfólk hjá Tinginum hava skrivað.

Gerðabókin er alment atkomilig, og hon vísir, at landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum higartil hevur verið á 4 fundum í uttanlandsnevndini. Á hesum fundum hevur nevndin fingið kunning um ymisk mál. Tó hevur hon IKKI fingið kunning um tað, sum higartil er komið burtur úr vitjanum hjá landsstýrismanninum í uttanlandsmálum í tilsamans 7 londum.

Sambært almennum upplýsingum hevur landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum havt fundir í hesum londum: Íslandi 9.-10. mars, Grønlandi 11.-13. mars, Liktinstein 15. mai, Noreg 26. mai og London, Isle of Man og Edinburgh 28.-30. apríl.

Um so er, at formaðurin í uttanlandsnevndini hevur fingið upplýsingar um, hvørji úrslit eru komin burtur úr fundunum í nevndu londum, eigur formaðurin uttan at drála at lata hinum nevndarlimunum upplýsingarnar. Um hesar upplýsingar ikki eru fevndar av tagnarskyldu, hevði verið hóskandi, at eisini tingfólk og almenningurin verða kunnað.

Úrslitið av fundunum í nevndu londum er kanska – vit vita tað jú ikki – týðandi partur av uttanlandspolitikki Føroya, og tað er ikki meira enn rímiligt, at tingfólk og almenningurin annars fáa innlit í politikkin.

Tað er ikki nóg mikið at seta seg at lesa burtur úr samgonguskjalinum, so sum formaðurin í uttanlandsnevndini gjørdi í tíðindaflutninginum hjá Útvarpinum fyrrapartin í gjár.

Tað grundleggjandi í málinum er, at Løgtingið má vita, hvør uttanlandspolitikkurin er. Tingið hevur jú skyldu at hava eftirlit við landsstýrinum.